**Beinta Løwe Jacobsen**
**løgtingsmaður**

Løgtingsmál nr.   /2020: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri august 2020-2

# Uppskot
# til
# eykajáttanarløgtingslóg
# fyri august 2020-2

Løgtingið

# § 3 Fíggjarmál

## A. Yvirlit

*Játtanar yvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | - | - | - |
| Løguætlan | 3.000 | 3.000 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **3.000** | - |
| 3.38.1. Vegir og havnir | | 3.000 | **-** |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |
| **3.38.1. Vegir og havnir** | | | |
| 07. Nýggir landsvegir (Løguj.) | J: | 223.500 | **-** |
| | **EYJ:** | **3.000** | - |

**Viðmerkingar**

Skotið verður upp at lata eykajáttan á 3 mió. kr. til trygdarútgerð til tunlarnar norður um Fjall og aðrar tunlar, har henda manglar.

Í juli mánaði kom eldur í ein bil í Árnafjarðartunlinum. Tá kom fram, at trygdarútgerð manglar uttanfyri tunnilin, m.a. bummar og ávaringarljós.

Landsverk hevur verið í miðlunum og sagt, at peningur er ikki tøkur til hesa útgerð. Tí verður skotið upp at lata eykajáttan á 3 mió. kr. til trygdarútgerð, sum bummar og ávaringarljós, uttanfyri tunnilsmunnarnar.

Í fyrsta lagi verður skotið upp, at henda útgerð beinanvegin verður sett upp við tunlarnar norður um Fjall, har nógv ferðsla er. Men slík útgerð eigur eisini at verða sett upp við aðrar tunlar, ið ikki hava hesa útgerð.

**Á Løgtingi, 4. august 2020**

Beinta Løwe Jacobsen